Eg helt eisini fyri við hendan mannin, at flaggið hekk aftur av hekkuna í eini bambustráðu. Hetta dámdi mær enn verri, tí tað, sum eg hevði sæð, var, at skipini flaggaðu á mesanmastrini.

Men her var orsøkin tann, at mesanmasturin var nýggj, og tí var ikki flagglína drigin í hana enn. Hetta ljóðaði eisini sum ein góð frágreiðing.

## Seinastu orðini hjá pápa

Eg var umborð allan tann dagin, teir fóru avstað. Teir lógu við eina træbrúgv hjá Óla á Heygum, sum var einasta bryggja í Vestmanna. Hon var ikki longri enn longdin á eini slupp. Hetta gjørdi tað lættari at fáa útgerð umborð. Tað vanliga var annars, at skipini lógu úti á vánni og fingu útgerðina og manningina førda umborð.

So eina ferð sigur pápi: "Nú haldi eg, at tú má sleppa tær í land, tí eg haldi, at teir fara at loysa." Eg hugdi rundan um meg. Eg sá ongan mann loysa, so eg látst ikki um vón. Menn vóru við úr ymiskum bygdum, og teir vóru allir komnir til skipið.

So gekk enn ein lítil løta. Tá kemur pápi aftur: "Ja, nú mást tú fara í land. Nú eru teir so farnir at loysa." Tá sá eg, at tað var álvari í. Tað hekk ein stormleytari av bolverkinum niður móti lúnningini. Eg minnist væl, at tá ið eg stóð í niðasta trininum á leytaranum, tá rópar pápi til mín: "Skikka tær nú so væl. Heilsa mammu og sig, at vit koma aftur." Hetta hevur ljóðað í oyrunum á mær hvønn dag síðani. Eg svaraði orðarætt: "Ja, tað skal eg gera."

Teir fóru so. Tað var so lítið at fiska á Suðurlandinum tað várið. Tað hevði verið so gott til fisk árini frammanundan frá 1929 til 1932. Hetta vóru góð fiskiár. Ì 1933 var meira vánaligt, og tað var enn verri í 1934. Eg haldi meg minnast, at teir fóru tann 24. mars. Eg fari so ikki meira enn ein dag skeivur.

Tað einasta, vit frættu aftur, var, at Kristoffur, beiggi mín, fekk eitt bræv frá pápa. Tað var skrivað, tá ið teir vóru inni í Íslandi, sum vanligt var hjá skipunum. Pápi skrivar, at teir liggja inni í Reykjavík, og at fiskaríið hevði verið so vánaligt. Hann skrivar eisini, at teir koma ikki heim fyrr enn nakað væl er liðið út í mai mánaða.

Tað einastandandi er, at hetta brævið framvegis er til, og vit kunnu endurgeva tað í fullum líki. Mamma man helst hava fingið bræv eisini, men tað er so ikki til. Aðrir av manningini hava rímiligt eisini skrivað heim. Um onnur brøv eru til, hevði tað eisini verið áhugavert at frætta.

## Ikki eitt orð um at pápin er deyður

So hendir tað, at skipini sum vanligt koma heim aftur út í mai. Hjá okkum systkjum var tað á sama hátt sum hjá systkinabarninum Julionnu, sum greitt frá fyrr í hesi røð. Pápi hennara Julius var eisini við. Hvørja ferð eitt skip hómaðist, vónaðu vit, at hetta var Neptun, men tað kom eingin Neptun. Eina ferð birtist ein vóm, tá ið tað frættist, at skiparin á Sjóløvuni skuldi hava sæð Neptun uppi á Vesturlandinum í Íslandi. Hetta var tó ikki so.

Einki verður tosað við okkum børnini um støðuna. Eg hoyrdi menninar práta, táið allir komu heim av Suðurlandinum tað várið, og eg royndi at lurta eftir teirra práti. Eg haldi meg avgjørt minnast, at allir søgdu tað sama, at Neptun mundi vera farin 3. mai, tá ið tað hevði verið so ringt veður. Eingin hevði sæð skipið eftir hendan dag.

Tað var á hendan hátt, at eg kom at skilja, at pápi var burtur med alla!

Eg havi so seinni roynt at fáa meira at vita um tað sum hendi. Eg kendi Andreas á Marknagili, búsitandi í Klaksvík. Hann var sonur Justines í Oyndarfirði, sum eisini var á Suðurlandinum hesa tíðina, helst við Silver Lining. Andreas hevði fingið dagbókina hjá pápanum, og hann hugdi eftir, hvat ið stóð har. Hann váttaði tað sama. Her stóð, at "natten til den 3. maj blev forrygende uvejr." Hetta var so tann endaliga váttanin um dagfestingina av hesum illveðrinum, sum helst hevur verið banin hjá pápa og øllum hinum.

## Orkaði ikki til minningargudstænastu

Skipini komu heim um hálvan mai. Hetta var kanska eitt sindur seinni enn vanligt. Helst hava skipini totast eitt sindur longri fyri at fáa meira upp í lastina.

Eg minnist ikki sum systkinabarnið Julianna, at prestur kom á vitjan, men tað mann hann hava verið, tá ið hann kom inn í grannahúsið.

Men prestur hevur so ikki verið beinanvegin, tí eg hoyrdi eina ferð mammu og mammu Julionnu tutla um, at tað var merkiligt, at prestur ikki hevði verið. Hann mann so hava verið aftaná tað.

Í eini frásøgn um Frelsunarherin varð sagt, at fólk frá teimum gingu í tey húsini í Vestmanna, sum høvdu mist. Her verður sagt: "Aldrig har jeg vel følt mig så fattig, som da vi i den lille bygden Vestmannahavn besøgte de mange hjem som ulykken havde ramt."

Frelsunarherurin hevði annars eisini ein hjálpargrunn til slík endamál, og hava tey helst leskað tey eftirsitandi.

Eg minnist eina ferð, at tvær konur úr Havnini komu inn til okkara, og tær munnu hava verið í hesum ørindum. Eg minnist, at tær sungu inni í stovuni. Hetta kann væl hava verið fólkið frá Frelsunarherinum.

Vit børn fingu ikki beinleiðis boð um, at pápin var deyður. Vit hoyrdu bara, hvat hini tosaðu um sínámillum. Sum frá leið skilti ein so, hvussu tað var vorðið.

Eina ferð kemur so próst Dahl at halda minningargudstænastu. Mamma fór í kirkju kanska við onkrum av smærru børnunum. Men eg hevði hoyrt so nógv leysaprát um hetta, at nú orkaði eg ikki meira. Eg fór niðan í hagan og setti meg har uppi at bíða. Eg kom ikki heim aftur, fyrr enn eg metti, at gudstænastan var av, og fór eg tá oman aftur. Tá var mamma komin aftur í køkin. Hon segði einki, og eg segði einki.

Vit systkin tosaðu heldur ikki um hetta okkara millum, tað kann eg nokk siga. Soleiðis var hugburðurin tá, meðan tað í dag verður ásannað, at tað ræður um at tosa sum mest um slíkar hendingar fyri tess skjótari at sleppa víðari í lívinum.

## Eisini sorg í Íslandi

Tá ið ein slík greinarøð verður skrivað kunnu koma íkøst frá lesarum. Ein av hesum er Demmus Hentze. Hann greiddi nú um dagarnar frá, at hann í 1960 var á einum fundi í Íslandi, har hann kom at hitta ein starvsfelaga frá Siglufjørðinum.

Hann fortaldi Demmusi, at tey kendu væl Óla Jákup. Teir vóru javnan inni á Siglufjørðinum, og tá plagdi Óla Jákup at koma við keks, sum var forkunnugt í Íslandi tá. Men í 1934 komu teir ikki. Og ikki fyrr enn á heysti í 1934 frætta tey hesi syrgiligu tíðindini um Neptun. Tá græt mamman!

Pápi hevði nógvar góðar vinir í Íslandi, sum hann kom sera væl út av tí við, og tað er eingin ivi um, at hann eisini var syrgdur í Íslandi.



*Abbin í Hvalvík, Hans Christoffer Joensen saman við børnunum Helannu og Julius. Julius gekk burtur og Helanna misti mannin við Neptun*



*Helanna gjørdist einkja við átta børnum*



*Kristoffur fekk seinasta brævið frá pápa sínum*